**Semingsuppskot**

**KAF**
**Og**
**LFH og FHF**

**Sáttmálaskeið og lønarkarmur:**
Sáttmálin verður, við fylgjandi broytingum, endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2020 til 31. desember 2022.

**1.**
Tann 1. januar 2021 hækkar mánaðarlønin 2,05%.
Tann 1. oktober 2021 hækkar mánaðarlønin 1,25%.

2.
Við gildi frá 1. oktober 2022: "Handverkarar ganga stigini 2 til 12."
Handverkarar, sum eru á stig 1, flyta á stig 2 – og varðveita sín starvsaldur. Handverkarar, ið hava staðið minst 12 mðr. á stig 11, flyta á stig 12.

3.
Í § 3 verður sett inn soljóðandi stk. 6:
"Stk. 6. Arbeiðsgevarin kann, tá ið serligar umstøður gera seg galdandi, við handverkara avtala eina serliga, persónliga flokking í eitt ávíst lønarstig. Flokkingin skal góðkennast av Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum."

4.
Sum nýggj grein § 3a verður sett:

**§ 3a. Starvsmetingarnevnd**
Stk. 1. Partarnir eru samdir um at seta eina starvsmetingarnevnd, við tveimum umboðum fyri hvønn partin, soleiðis at Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna hava hvør sítt umboð.
Uppgávan hjá nevndini er at útbyggja og eftirmeta lønarskipanina, umframt at viðgera øll flokkingarmál, ið verða reist av antin Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum ella Føroya Handverkarafelag ella Landsfelag Handverkaranna.

5.
Í § 8 verður skoytt uppí: "og § 7a".

s s
D JM

**Tórshavn tann 11. mai 2021**

Vegna
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Pauli Trond Petersen, fomaður

/Anita Fuglø，samráðingarleiðari

Vegna
Landsfelag Handverkaranna

Dánial Pauli Djurhuus, formaður

Føroya Handverkarafelag

Suni Simonsen, formaður

SS